

## Liðformaður troyttur av fótbólti

Um vikuskiftið spældi danska felagið Brøndby seinasta dystin í ár. Nú fara spælararnir í feriu í fimm vikur, áðrenn fyrireikingarnar til seinnu hálvu av superliguni byrja aftur. Tað hevur ikki gingið nakað serligt hjá Brøndby í ár, og liðformaðurin Per Nielsen ætlar sær at halda fullkomiliga frí frá fótbólti næstu tíðina.

- Nú havi eg fingið feriu, og tað eri eg glaður fyri. Eg ætli mær ikki at hugsa ella tosa um fótbólt næstu fimm vikurnar, sigur 33 ára gamli Per Nielsen við bold.dk

## Millardir til Chelsea

Russiski eigarin av enska felagnum Chelsea tryggjar nú felagið í nógv ár frameftir. Roman Abramovich, er til reiðar at leggja góðar 5,5 milliardir krónur í ein grunn, sum skal hjálpa til við rakstrinum av Chelsea. Síðani Abramovich keypti Chelsea í 2003, hevur hann lagt fleiri milliardir krónur í felagið. Tað sigst, at sonur Roman skal yvirtaka leiðsluna av felagnum, tá ið hann verður nóg gamal. Arkady er 12 ára gamal.

VB-Neistin 18-31 (10-17):

# Kontra-álopini søktu VB

**Neistin vann trivaligan sigur í Vági, har rennisterku gestirnir runnu VB sundur og saman**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Talan gjørdist ikki um tann spennandi oddadystin, sum mong høvdu roknað við, tá Neistin vitjaði í Vági sunnudagin. Bæði VB og Neistin hava higartil víst, at Stjørnan ikki skal taka nakað fyri givið í landskappingini, og við oddasessinum í grundspælinum í eygsjón, høvdu báðir partar nógv at spæla fyri.

### Mistøkini revsað

Fyrstu góðu løtuna bendi alt eisini á eina spennandi uppgerð. Bæði liðini løgdu nógva orku í verjupartin, og fyrstu 20 minuttirnar gekk alt rættiliga javnt fyri seg.

Hjá Neistanum ráddi fyrst og fremst um at hava gott tak á Daivu Toumaite, og hennara leiklutur varð fyri tað nógva eisini avmarkaður.

Og tá helst besti spælarin í landinum so eisini byrjaði at gera mistøk, vóru Neistakvinnurnar skjótar at taka av. Kontra-álopini fóru sendandi oman móti VB-hálvuni, og longu undan steðginum hevði Neistin sett seg tungt á dystin.

Tað gav teimum bláu neyðuga friðin yvir spælið, og seinni hálvi tímin gjørdist tí fyri tað nógva hampuliga róligur. Neistin hevði ikki fyri neyðini at overva seg, men tær hildu støðugt fast um leiðsluna, sum var vunnin.

Og so kundu tær veruliga sláa sigurin fastan seinastu løtuna. Í mun til flestu av hinum liðunum, so hevur Neistin sera góða breidd í hópinum, og tað gav at bíta, tá orkan hjá VB var um at ganga undan. Soleiðis fekk VB einki mál seinastu 10 minuttirnar, har Neistin veruliga sementeraði sigurin.

### Oddasessur uttan týdning

Við stigunum vann Neistin seg upp á oddasessin í grundspælinum, og sálarliga hevur hetta heilt víst stóran týdning. Spurningurin er tó, hvat hetta kann nýtast til í praksis, tí í verandi skipan hava hvørki grund- ella endaspælið heilt stóra upp á seg. Fyrst og fremst, so ræður um at verða millum tey fýra ovastu fyri jól, og so er um at raka dagin, tá avgerandi hálvfinalurnar og møguliga finalan standa á skránni.

Tí var tapið sum so eingin vanlukka hjá VB, men hetta prógvaði tó, at liðið enn hevur nakað at arbeiða við. Tað er tó ein trupulleiki, tá berandi kreftirnar á liðnum ikki rigga optimalt, tí tað eru hesar, sum yngru spælararnir skulu lena seg uppat.



*Tað vóru verjurnar og kontra-spælið, sum vóru avgerandi, tá Neistin vann stórsigur í Vági*

*Mynd: Áki Bertholdsen*

**FAKTA**

**VB-Neistin 18-31 (10-17)**
**Málskjúttar**
**VB:** Daiva toumaite 7, Ivana Ljubjeic 4(1), Teresa Joensen 4(1), Jóna Thorsteinsson 2, Una Egilsdóttir 1(1)
**Neistin:** Nioleta Radu Hansen 15(2), Katja Eigeman 4, Heidi Maria Akselsen 4, Ása á Neystabø 3, Unn Kragesteen 3, Maria Dahl 1, Rakul Augustinussen 1
**Brotskøst:** VB 4, Neistin 3
**Útvísingar:** VB 1, Neistin 2

## Tær vóru betri fyri

Egil Steintórsson, venjari hjá VB, var rættiliga avkláraður, tá hann varð biðin um at gera viðmerkingar til dystin móti Neistanum.

- Vit fylgja væl við teimum fyrstu 20 minuttirnar ella so, men so gongur galið. Vit gera nøkur mistøk í álopinum, og tað revsar Neistin við nøkrum kontra-álopum, og so var ikki hugsingur um at koma aftur í aftur hjá okkum.

Dysturin merkir eftir øllum at døma, at VB endar á triða plássinum í grundspælinum, og tað er í sjálvum sær nakað, sum Egil er væl nøgdur um.

- Tekur tú útgangsstøði hjá okkum, har stór útskifting var á liðnum, so er hetta heilt ok. Men tað skerst ikki burtur, at tað kennist keðiligt, at vit hava tapt tveir av heimadystum okkara. Vit hava kanska bestu áskoðararnar í landinum, og tí er tað altíð keðiligt at tapa á heimavølli. Hinvegin eru júst góðu áskoðararnir eisini ein positivur trupulleiki hjá okkum, tí fleiri av ungu spælarunum mugu læra at spæla við trýstinum, sum hetta gevur.

KÍF-VÍF 27-30 (13-12):

# Enn ein sigur til VÍF

**KÍF førdi stóran part av dystinum, tá teir møttu VÍF í bestu mansdeildini. Móti endanum vendi VÍF tó dystinum, og síðstu løtuna var sigurin ikki í vanda.**

HONDBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Heimaliðið úr KÍF fekk betru byrjanina ímóti oddaliðnum. Frá fyrsta bríksli sást týðiliga, at KÍF ætlaði sær stig í hesum dystinum. Teir stríddust um hvønn bólt, og ikki gekk lang tíð, so høvdu teir vunnið seg nøkur mál fram um VÍF. Um miðjan fyra hálvleik var støðan 8-4 til KÍF, og serliga gav verjan hjá heimaliðnum vestmenningum stórar trupulleikar. Eisini hóast hendan viknaði nakað, tá Rógvi Weihe mátti út eina løtu.

Munurin restina av hálvleikinum lá um tvey ella trý mál, men í síðsta minutti fangaði Ingi Olsen bóltin frá kollfirðingum, og so kundi hann minka um munin niður í bara eitt mál.

Móti endanum av hálvleikinum noyddist málverjin hjá VÍF Dejan Lacok av vøllinum við einum knæskaða. Hann hevði leikt ein góðan dyst í málinum, men vestmenningar eiga tveir góðar málmenn, og í staðin kom Eli Müller inn í málið.

### 10 minuttir vendu dystinum

KÍF var eisini liðið, sum legði betur fyri í seinna hálvleiki. Hesin var bara 7 minuttir gamal, so hevði KÍF økt um leiðsluna upp í 18-15, og KÍF tóktist hava fult tamarhald á støðuni hesa løtuna. Men so prógvaði VÍF veruliga, hví teir eru oddalið. Teir fingu glið á álopsspælið, samstundis sum verjan og málverjin fingu fatur á skjúttunum hjá KÍF, og næstu 10 minuttirnar skoraði VÍF sjey ferðir, meðan KÍF einki mál fekk. Nú var dysturin vendur fullkomiliga á høvdið, og knappliga var VÍF á odda 18-22.

Næstu løtuna økti VÍF enn meir um leiðsluna, og tá seks minuttir vóru eftir vísti talva 21-27, men so fekk KÍF aftur gongd á spælið. Næstu tríggjar minuttirnar minkaðu teir til 25-28, men tá KÍF brendi eitt mótálop við góuðm tveimum minuttum eftir, so var dysturin í roynd og veru avgjørdur. Við sigrinum – sum var tann sætti á rað - varðveitti VÍF oddasessin.

**FAKTA**

**KÍF-VÍF 27-30 (13-12)**
**Málskjúttar:**
**KÍF:** Damir Oros 9, Daniel Rapa 9 (2), Mirko Milenkovic 4, Gert Hansen 2, Teitur Joensen 2, Rógvi Weyhe 1
**VÍF:** Ingi Olsen 5, Áki Olsen 5, Regin Joensen 4, John Zachariassen 4, Agnar Joensen 4 (1), Áki G. Olsen 3, Sámal Joensen 3, Sjúrður Poulsen 2
**Brotskøst:** KÍF 2, VÍF 2
**Útvísingar:** KÍF 2, VÍF 1
**Dómarar:** Kristian Joensen & Kartin Joensen